## DAGSINS MEINING

# Tjúgu ár við djassinum

Tað ljóðar í grundini heilt ótrúligt, at tað longu eru liðin tjúgu ár síðan Djassfestivalurin ella Tórshavnar jazz-, fólka- og bluesfestivalurin varð hildin á fyrsta sinni. Byrjanin við hesari tónleikastevnu var mestsum byrjanin til eina nýggja tíð, eina tíð, hvar Føroyar av álvara mentanarliga gjørdust ein partur av altjóða rútmiska tónleikaheiminum. Fáur mundi tá gruna, at her varð støðið lagt til eina fasta afturvendandi siðvenju og eina stevnu, sum ikki bert Havnarfólk, men stórir partar av føroyingum hava tikið lut í.

Við djassfestivalunum kom rútmiski tónleikurin av álvara út til fólkið, og tað má tí vera rætt og rímiligt at hefta seg við hendan runda dagin. Øll hesi tjúgu árini hevur djassfestivalurin bjóða føroyingum sera góðan rútmiskan tónleik á høgum altjóða støði. Henda tónleikastevna hevur verið dygdargott undirhald fyri áhoyrarnar og ein avbjóðing til heimliga rútmiska tónleikaumhvørvið. Talan hevur verið og er um eitt sera gott tiltak.

Eitt annað sera gott tiltak er Summartónar, ið er ein klassisk tónlistastevna. Summartónar hava kanska ikki so høgan profil ella umhvarv sum Djassfestivalurin, men Summartónar eru ikki minni týðandi fyri tónlistina fyri tí. Djassfestivalurin saman við Summartónum eru kærkomin høvi hjá føroyingum at njóta góðan rútmiskan ávikavist klassiskan tónleik. Hetta eru sera góð tilboð, og alt fleir nýta høvið at fáa eina tónlistalæiga uppliving, sum ikki býðst á hvørjum degi.

Almenningurin hevur tí fyrireikarunum fyri báðum stevnum nógv fyri at takka. Mesta fyrireikingin er sum vanligt verið gjørd av sjálvbodnum, sum leggja alla orku í at útvega landsmonnum eitt so gott djasstónleikatilboð sum møguligt. I tjúgu ár hava fyrireikararnir av Djassfestivalinum megnað at skipa fyri hesum megnartiltaki. Vit eru hesum fólkum takksom, eingin nevndur - eingin gloymdur.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# »Sound of Glory« í Vesturkirkjuni

**Bergur D. Joensen,**
*sóknarprestur*



Seinasta sunnukvøld hevði TenSing-kórið hjá KFUM & K í Havn, Sound of Glory, eina væleynaða konsert í Vesturkirkjuni. Sangirnir, tey sungu, eru slíkir, sum eru vælkendir úr gospel-heiminum, og so vóru m.a. eisini nakrir fittir barnasangir á skránni. Ætlanin var, at konsertin skuldi vera í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, men var hon flutt til Havnar vegna jarðarferð. Kórið varð stovnað fyri nøkrum fáum árum síðan, og tá ið hetta var fyrsta almenna konsertin, vóru teir ungu kórlimirnir sera spentir. At vera kórleiðari sum tannáringum og at syngja alment, er jú ein stór avbjóðing. Á skránni hjá Sound of Glory er ein ferð um Noreg til Prag í summar, har skipað verður fyri eini stórari stevnu fyri arbeiði hjá KFUM & K í Evropa. Tann góði felagsskapurin, tær spennandi avbjóðingarnar, og ikki minst boðskapurin, sum kórið syngur, ger hetta kórið til eitt týðandi tilboð til ungdóm í Suðurstreymi. Her skal bæði ljóða ein tøkk fyri tað arbeiðið, kórið ger, og ein kunning til teirra, sum hoyrdu lýsingina undan konsertini: Tað var, sum rímiligt er í eini kirkju, ikki dansur sunnukvøldið í Vesturkirkjuni - heldur ikki drama. Ein missskiljing gjørdi, at lýsingin til konsertina, sum skuldi vera í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, var send sum lýsing til Vesturkirkjuna eisini.

Góða ferð til Prag verður ynskt kórium.

Jesus fylgi tykkum!

# 40 ára hátíðarhald í Christianskirkjuni

**Í sambandi við at Christianskirkjan verður 40 ár mánadagin, verður ein hátíðargudstænasta sunnumorgunin klokkan 11 og ein hugnaløta í kirkjukjallaranum aftaná**

HÁTÍÐARHALD
*Solby A. Eliasen*



*Mánadagin 7. juli verður Christianskirkjan 40 ár. Í tí sambandinum verður hátíðargudstænasta sunnumorgunin við altargongd og ein hugnaløta í kjallaranum aftaná*

**Klaksvík:**
Mánadagin 7. juli eru 40 ár, síðani Christianskirkjan bleiv vígd. Í hesum sambandi verða onkur tiltøk í kirkjuni fyri at hátíðarhalda dagin.

Sunnumorgunin klokkan 11 verður hátíðargudstænasta við altargongd, har Niels Pauli Danielsen, sóknarprestur, heldur prædikuna. Hin presturin, Hans Eiler Hammer, og allir kirkjutænararnir verða somuleiðis tilstaðar í kirkjuni henda dagin. Hans Eiler sigur, at teir hava gjørt av, at søga kirkjunnar skal verða í miðdeplinum henda dagin, og sálmarnir eru eisini valdir út, soleiðis at teir passa til dagin.

Aftaná gudstænastuna verður ein hátíðarløta í kirkjukjallaranum. Júst hvat fer at verða á skránni har, veit Hans Eiler Hammer ikki at siga við vissu, men kirkja býður øllum at vera hjartaliga vælkomnum í kjallaran til ein kaffimunn og eina hugnaløtu.

Eitt annað heldur øðrvísi tiltak verður eisini í kirkjuni. Emmaus hevur sína summarstevnu hetta vikuskiftið, og tey fara so at skipa fyri einum stórum felagsmøti fyri bæði Emmaus og KFUM og K sunnukvøldið í kirkjuni. Møtið byrjar klokkan seks.

– Tey høvdu líka sum onki høli til eitt so stórt møti, og tá kirkjan ikki verður nýtt um hasa tíðina sunnukvøldið, so spurdu tey, um tey ikki kundu halda tað í kirkjuni, greiðir Hans Eiler frá.

Ein gospelkonsert var eisini hildin í kirkjuni fyri tey ungu í sambandi við hátíðarhaldið, so eitt sindur verður kortini gjørt burturúr.

Hans Eiler Hammer sigur, at tá tað varð avgjørt, hvussu dagurin skuldi haldast, tá tosaðu tey um at bjóða bispi, prósti og øðrum hendavegin. Men tað er tíverri so óheppið, at vígslan og innsetanin av prestinum í Hvalvíkar kirkju liggur sama dag sum hátíðargudstænastan, so bæði bispur, próstur og fleiri aðrir prestar verða í Hvalvík sunnudagin.

– Tað er sjálvandi harmiligt, at tað skal fella á sama dag, men soleiðis er tað bara viðhvørt, sigur Hans Eiler Hammer og leggur afturat, at í Klaksvík høvdu tey sæð tað sum náttúrligt, at teir vóru her til hátíðarhaldið.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Fuglfirðingar halda stevnu um vikuskiftið

**Stevna er í Fuglafirði hetta vikuskiftið. Í ár er tað millum annað FM-kappróður, framsýningar, dansitiltøk, hoppiborgir og skemt, sum skal lokka fólk á stevnu**

VARMAKELDU-STEVNA
*Eyðun Klakstein*



*Gomlu tónleikahetjurnar úr Fuglafirði, Silly Boys, fara at spæla til dans í Mentanarhúsinum í Fuglafirði á varmakeldustevnu*

Nógv forvitnislig tiltøk eru á skránni, nú fuglafirðingar fara at halda árligu varmakeldustevnuna.

Sambært skránni fyri stevnuna vóru fyrstu tiltøkini mikudagin, men stóru dagarnir eru leygardagurin og sunnudagurin. Og tað er eisini leygardagin, at setanarhald verður við Bókasavnið. Har fer Marjun Sigurðardóttir at røða.

Í ár er FM-kappróður á skránni í Fuglafirði, og tað ger ikki fortreytirnar fyri einari góðari stevnu verri. Fuglafirðingar hava FM-kappróður annaðhvørt ár, og leygardagin fer at tær ymsu manningarnar at kýta seg í Fuglafirði.

Nordvesten mentanarstevnan er í Klaksvík og Fuglafirði um vikuskiftið, og nógv Nordvesten-tiltøk eru partur av varmakeldustevnuni.

Tað er ÍF, sum samskipar tiltøkini á stevnuni, og har siga tey, at tey í ár hava brúkt nakað meira av tíð til at fyrireika stevnuna enn vanligt hevur verið.

### Tónleikur og sms

Ymiskar framsýningar eru eisini á skránni. Bæði í Ribarhusi og fimleikarhøllini í skúlanum eru listaframsýningar, og har eru tey fremstu lokalu listarfólkini við.

Í svimjihøllini fara limir í Tórshavnar RC felag at hava modelbátasigling.

Nógv danstitiltøk verða eisini at fara til á stevnuni. Bæði í Mentanarhúsinum í Fuglafirði og í ítróttarhøllini á Kambsdali verður dansur.

Fríggjakvøldið og sunnukvøldið spæla Eyðun & Terji í Mentanarhúsinum, og leygarkvøldið fara teir at spæla saman við hetjunum úr Fuglafirði, Silly Boys. Leygarkvøldið er 18 ára aldursmark.

Í høllini á Kambsdali verður DJ-show, har James Olsen verður ein av undirhaldarunum.

Lutaseðlar hoyra eisini til summarstevnurnar, men í ár hevur ÍF gjørt eina øðrvísi kapping við stórum vinningum. Ein Ford-bilur stendur upp á spæl, og fólk kunnu verða við í kappingini við at senda sms umvegis fartelefonina. Vinnarin av kappingini verður avdúkaður sunnukvøldið.

Sjónleikarfelagið í Fuglafirði fer at hava sýning av Varmakelduteitinum, og sambært skránni verður tað teitið, sum fer at runda stevnuna av mánakvøldið.

# Seks rækjutrolarar á veg heim við fullari last

**Tað er neyvan hent fyrrr og kemur kanska heldur ikki at henda aftur, at seks rækjutrolarar eru á veg heim ísenn við fullari last**

RÆKJUVINNAN
*Áki Bertholdsen*



*Hvilvtenni er ein av teimum seks rækjutrolarunum, sum koma heim hesar dagarnar*

Hesar dagarnar eru ikki færri enn seks rækutrolarar a veg heim av Flemish Cap. við fullari last.

Tað er neyvan hent áður, at so nógvir rækjutrolarar eru á veg heim ísenn við fullari last.

Og sum gongdin er við rækjuprísinum, eru tað mong í rækjuvinnuni sum ivast í, um tað nakran tíð fer at henda aftur, sum sum støðan er nú, verða ikki nógvir rækjutrolarar eftir um eitt ár.

Høgifossur er komin heim við einum 600 tonsum og Hvilvtenni eisini vid umleið 600 tonsum.

Harafturat kemur Arctic Viking í dag við 450 tonsum og Kappin somuleiðis við einum 400 tonsum Hetta er fyrsti túrurin hjá Kappanum síðani Rækjuvirkið keypti hann.

Í morgin kemur so Sjúrarberg við umleið 500 tonsum og mánadagin er Sólborg væntandi við umleið 430 tonsum.

Sostatt koma hesir bátarnir við umleið 3.000 tonsum av rækjum, sum skulu leggjast upp í Føroyum og tað skuldi sæst aftur í Føroyum.

Størri parturin eru helst rækjur sum helst fara til Oyrar til pilkingar.

### Lagnunnar speisemi

Tað má sigast at vera lagnunnar speisemi, at allir hesir trolararnir eru á veg heim, júst um sama mundi sum landsstýrið hevur gjørt av at bakka fyri Kanada og at stongulin í Kanadiskum havnum sostatt er við at verða tikin av.

Fyri hesi skipini verða tað helst 11/2-2 mánaðir áðrenn tey aftur skulu lossa, so tey hava so ikki tørv á at sleppa inn í Canada júst nú, ið landsstýrið hevur avgjørt at bakkað fyri Canada.

Keldur í rækjuvinnuni siga, at fiskiskapurin á Flemish Cap hevur verið heilt hampiligur í seinastuni og at veðrið hevur verið gott. Tó hevur lítið verið at fingið um næturnar.

Men prísirnir eru framvegis sera lágir.

– Og reypið í bløðunum í seinastuni av manningum á grønlenskum rækjuskipum um, at teir royna at seta veiðimet hvønn dag, bendir á, at teir framvegis halda, at teir kunnu framleiða seg burturúr trupuleikunum, heldur enn at minkað um fiskiskapin fyri at fáa prísirnar upp, siga keldur í rækjuvinnuni.

– Men hetta verður helst eins stokkutur hiti, tí samstundis sum øktu nøgdirnar trýsta prísin niður, økja tær samstundis um útreiðslurnar til landing, farmagjald, pakning o.s.fr.

– Føroysku rækjuskipini kunnu bert vóna, at bæði grønlendsku og canadisku reiðaríini fyrr ella seinni vakna og síggja veruleikan á marknaðinum í eyguni.

– Men um hetta hendir áðrenn ella aftaná at føroyski rækjuflotin er farin av knóranum, er tó ilt at siga.